# TÆNASTUR Í LÍVDINI – LÝSING

*Heystið 2012*

## BØRN OG UNG

**BARNAANSING**
Henda tænasta fevnir um er at taka sær av børnunum niðan fyri skúlaaldur undir báðum møtunum sunnudag. Tað eru 8 lið, sum taka sær av hesi tænastu, og hevur tú tí bert ábyrgd áttandu hvørja viku.
**Kontaktfólk:** Sóley Samuelsen (221917) og Marin Brimsvík (583928)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Absalon Áargarð (594020)

**SUNNUDAGSSKÚLIN**
Sunnudagsskúlin hevur skipaða undirvísing fyri børnini. Allir flokkarnir fylgjast við somu evnum, men á ymiskum stigum, alt eftir aldrinum á børnunum. Sunnudagsskúlalærarnir arbeiða í bólkum, sum skiftast um at hava sunnudagsskúlan. Tørvur er eisini á avloysarum, sum kunnu taka um endan, tá onkrum berst frá, og hjálparfólki at taka sær av børnunum inni í skúlastovunum.
**Kontaktfólk:** Siri Davidsen (421712) og Sólvá Vang (272494)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Absalon Áargarð (594020)

**UNGLÍV**
Ein tænasta fyri ung í 10-12 ára aldrinum, sum koma saman til undirvísing og samfelag á seinna møtinum sunnumorgun. Tørvur er á samskiparum, undirvísarum og hjálparfólki, sum eru góð við ung fólk.
**Kontaktfólk:** Magni á Lakjuni (318686)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Absalon Áargarð (594020)

**ANSING Í HØLLINI**
Ein tænasta fyri børn í skúlaaldri, sum fara inn í fimleikarhøllina at spæla seinnu helvtina av familjumøtinum sunnumorgun. Tað eru 6 lið, sum taka sær av hesi tænastu, og hevur ein tí bert ábyrgd sættu hvørja viku. Tørvur er á fólki at spæla við børnini og ansa eftir teimum henda hálva tíman.
**Kontaktfólk:** Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Absalon Áargarð (594020)

**ALIVE**
Endamálið við Alive er at røkka út til trúgvandi og vantrúgvandi ung við evangeliinum. Hetta tiltak er hvørt leygarkvøld og er eyðkent av góðum tónleiki, viðkomandi talu og góðum samfelagi.
**Kontaktfólk:** Rúni Højgaard (213767) og Lis Højgaard (322334)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

## HIRÐATÆNASTUR

**GLÓÐIN**
Endamálið við hesi tænastu er at hava eitt stað, har øll tey, sum eru sorgarbundin, niðurboygd, vónleys og friðleys, kunnu finna kærleika, gleði, vón og frið í Kristusi. Henda hirðatænasta er serliga fyri tey, sum hava stórar trupulleikar at stríðast við, fyri at veita teimum serkøna hjálp.
**Kontaktfólk:** Elin Wang (214102)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

**HJÁLPARHONDIN**
Vit vísa umsorgan á tann hátt, at vit fara inn á gólvið við bakstri, tá onkur hevur átt, er álvarsliga sjúkur ella sjúkur í longri tíð, tá fólk verða rakt av sorg ella koma í aðrar umstøður, sum gera, at tey hava brúk fyri serligari umsorgan.
**Kontaktfólk:** Beinta Áargarð (512655)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Absalon Áargarð (594020)

**AVVARÐANDI HJÁ MISNÝTARUM**
Bólkar, har samlivarar, børn, foreldur og systkin hjá misnýtarum kunnu koma saman at uppbyggja, stuðla og hjálpa hvør øðrum.
**Kontaktfólk:** Rúna Berghamar (516033)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

**VÆLKOMUBÓLKURIN**
Ein tænasta, sum hjálpir vitjandi og nýggjum samkomulimum at "koma inn í" samkomuna. Tænastan fevnir um at standa við dyrnar sunnumorgun og bjóða fólki vælkomnum, standa við lýsingarborðið og vera tøkur til samtalur í steðginum og aftan á møtini og at eggja fólki til at koma við til skeiðið "Hvat er og hvat ger Lívdin."
**Kontaktfólk:** Anna Larsen (220055) og Annika A. Nielsen (580630)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

**FORBØNARTÆNASTAN**
Endamálið er at vera tøkur at biðja fyri fólki leygarkvøld á Alive og sunnumorgun.
**Kontaktfólk:** Unn Zachariassen (568080) og Preben Hansen (228004)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

**BØNARBÓLKUR FYRI KVINNUR**
Andaligt samfelag fyri kvinnur, sum koma saman hvønn fyrsta leygarmorgun í hvørjum mánaði.
**Kontaktfólk:** Poula Sørensen (510322)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jóhan Syderbø (554818)

**KYKNUBÓLKAR**
Tað er umráðandi, at einstaklingar og familjur koma fast til regluligu tiltøkini, ið Lívdin skipar fyri, men vit meta eisini, at tað er neyðugt, at øll tey, sum hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, læra hvørt annað betur at kenna í smáum kjarnum við í mesta lagi 12 fólkum.
**Kontaktfólk:** Jógvan Zachariassen (522212)
**Kontaktfólk** í leiðsluni: Jógvan Zachariassen (522212)

## ÚTBÚGVING

### SKEIÐVIRKSEMI
Høvuðsendamálið við skeiðvirkseminum í Lívdini er at føra fólk upp „trappustigan" við at eggja teimum til at halga seg sjálv meir og meir andaliga.
**Kontaktfólk:** Jógvan Zachariassen (522212)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

### MØTILEIÐSLA
Ein bólkur, sum samskipar og leiðir møtini sunnumorgun. Bólkurin velur eisini evni og finnur talarar til møtini.
**Kontaktfólk:** Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

### HAGNOS
Hagnos vil reisa eitt ættarlið, sum stríðist fyri reinleika, og bjóðar fólki til skeið og fyrilestrar, sum kunnu hjálpa viðvíkjandi hesum evninum. Hagnos vil røkka samkomurnar kring Føroyar við hesum evninum.
**Kontaktfólk:** Arnold C. Jakobsen (510000) og Judith Lindarstein (271466)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

## LOVPRÍSAN

### SANGARAR / TÓNLEIKARAR
Endamálið við tónleikinum og sanginum í samkomuni er at hjálpa fólki at koma nærri Gudi gjøgnum tónleik og sang.
**Kontaktfólk:** Svend Åge Drewsen (239945)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

### TEKNIKKUR OG LJÓÐ
Henda tænastan tekur sær av øllum tí tøkniliga tónleikinum og sanginum. Tænastan umfatar at seta anlegg og hátalarar upp og seta tey til hvønn sunnudag, bæði á møtinum og í sunnudagsskúlanum, og at rudda av aftur, tá møtið er liðugt. Eisini umfatar henda tænasta at sita við miksipultin sunnudag.
**Kontaktfólk:** Karl Johannesen (521339) og Tór Arni Samuelsen (259909)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

### BREYÐ OG VÍN
Skipa fyri, at breyð og vín er klárt til tilbiðjanarløtuna sunnumorgun, og at posin til peningainnsavning fer runt.
**Kontaktfólk:** Leivur Guttesen (313254) og Hans G. Thomsen (312968)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

### BØNARBÓLKAR
Skipa fyri bønarløtuni týskvøld í Lonini og fyri øðrum serligum bønartiltøkum gjøgnum samkomuárið.
**Kontaktfólk:** Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jógvan Zachariassen (522212)

## MISSIÓN

**ELDRASAMBÝLIÐ Í HOYVÍK**
Endamálið við hesi tænastu er at røkka út til tey gomlu, sum búgva í eldrabýlinum Oman Hoydalar í Hoyvík. Hetta tiltak er eina ferð um mánaðin, har vit koma saman at syngja, biðja, hava eitt orð og hava samfelag við tey gomlu har. Tørvur er á fólki at stuðla sangin og á spælarum og fólki at hava eitt orð ella ein vitnisburð.
**Kontaktfólk:** Leivur Guttesen (313254)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**TRÚBOÐARABÓLKUR**
Ein bólkur, sum hevur regluligt samband við trúboðarar okkara og skipar fyri øllum samskifti millum trúboðarar og samkomu. Tá tørvur er á praktiskari ella andaligari hjálp, hevur hesin bólkur ábyrgdina av, at neyðug hjálp verður útvegað.
**Kontaktfólk:** Rúna Berghamar (516033)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**KVINNUTILTØK**
Skipað verður regluliga fyri ymiskum tiltøkum soleiðis at andaligi og sosiali trivnaðurin millum kvinnur gerst alt betri. Tá tiltøk eru er altíð brúk fyri alskyns fólki at skipa fyri andaliga og tímiliga.
**Kontaktfólk:** Lív Clementsen (516714)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

## MIÐLAR

**HEIMASÍÐAN**
Endamálið við heimasíðuni hjá Lívdini er at geva Lívdini eitt ”andlit” úteftir – at kunna, samskifta og bjóða fólki at koma á møtini.
**Kontaktfólk:** Einar Vang (243632) og Tonny Brimsvík (794314)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**KUNNINGARRITIÐ OG FACEBOOK**
Regluligt kunning til allar samkomulimirnar.
**Kontaktfólk:** Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**LÝSINGARBORÐIÐ OG EINFALDARIN**
Henda tænastan fevnir um at hava allar praktiskar upplýsingar, sum viðkoma Lívdini, frammi á borðinum, sum stendur í gongini hvønn sunnumorgun, so sum bønarbrøv, bløð, tekningarlistar og annað. Tænastan umfatar at leggja alt á borðið, áðrenn møtini byrja, og at rudda av aftur, tá møtini eru liðug. Tænastan umfatar harumframt at savna, uppseta og prenta mánaðarliga tíðindablaðið ”Einfaldarin”.
**Kontaktfólk:** Birgitte og Magnus Gunnarsson (216135)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**LÝSINGAR TIL FJØLMIÐLAR**
Endamálið við hesi tænastu er at fáa øll tiltøkini í Lívdini lýst í fjølmiðlunum. Hevur tú hug at hjálpa við hesi tænastu, kanst tú seta teg í samband við ábyrgdarfólkið.
**Kontaktfólk:** Anna Larsen (220055)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**RÆTTLESTUR**
Endamálið við hesi tænastu er at rættlesa alt tað skrivliga tilfarið, sum verður brúkt í Lívdini ella sent út frá Lívdini. Tað umfatar rættlestur av sangum, lýsingum, greinum, power point og øðrum.
**Kontaktfólk:** Rúna Berghamar (516033)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**SJÓNVØRPA**
Henda tænastan fevnir um at taka sær av sjónvørpuni sunnudag og at gera skjalið klárt til sunnudag (at seta sangir og annað inn) og at sita við uppvørpuna á báðum møtunum sunnudag.
**Kontaktfólk:** Tonny Brimsvik (794314) og Mourits Clementsen (514717)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**STREAMING**
Henda tænasta ger tað møguligt hjá fólki um allan heimin at hoyra møtini sunnumorgun beinleiðis á alnótini. Hetta umfatar at sita við telduna sunnumorgun og síggja til, at sambandið við alnótina er gott.
**Kontaktfólk:** Tonny Brimsvik (794314) og Mourits Clementsen (514717)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**TULKANARTÆNASTA**
Vit hava fleiri útlendingar, sum búgva í Føroyum, og nakrir teirra ganga í Lívdini. Tørvur er á at tulka taluna beinleiðis á seinna møtinum til enskt, soleiðis at útlendingar kunnu hoyra boðskapin. Tørvur er á fólki, sum duga enskt og føroyskt.
**Kontaktfólk:** Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

## UMSITING

**UPPSETING OG AVRUDDING**
Henda tænasta fevnir um at taka sær av øllum tí praktiska viðvíkjandi uppseting og avrudding í sambandi við møtini sunnudag. Tað eru 8 lið, sum taka sær av hesi tænastu, og hevur ein tí bert ábyrgd áttandu hvørja viku.
**Kontaktfólk:** Árant Jacobsen (234740)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jóhan Syderbø (554818)

**BAKING OG VASKING**
Henda tænasta fevnir um er at taka sær av samfelagsløtuni sunnudag, at baka, gera te og kaffi og borðreiða fyri samkomuni. Køksliðið tekur sær eisini av vaskingini eftir møtini sunnudag. Tað eru 8 kølslið, og tú hevur tí bert ábyrgd áttandu hvørja viku.
**Kontaktfólk:** Sunnvá Jacobsen (269285) og Jórun Jakobsen (265152)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jóhan Syderbø (554818)

**BYGGIBÓLKURIN**
Ein bólkur, sum arbeiðir við nýggja samkomubygninginum hjá Lívdini.
**Kontaktfólk:** Árni Jakobsen (210580)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jóhan Syderbø (554818)

**FÍGGJARBÓLKURIN**
Fíggjarbólkurin skal síggja til, at allur peningur, sum kemur inn til Lívdina, verður rætt og sámiliga avgreiddur. Uppgávan hjá fíggjarbólkinum er at býta peningin út eftir tí skipan, sum fíggjarbólkurin hevur sett upp.
**Kontaktfólk:** Lena Hvítklett (221222), Hjalti Hvítklett (508696) og Birgir Nielsen (514499)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**NAVNALISTIN**
Endamálið við hesi tænastu er at fáa tey, sum hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, á ein lista við nøvnum, bústøðum, telefonnumrum og teldupostadressum. Hesin listi lættir um samskiftið í Lívdini, men verður eisini brúktur sum ein bønarlisti, tá ið vit biðja hvør fyri øðrum.
**Kontaktfólk:** Beinta Áargarð (512655) og Absalon Áargarð (594020)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Absalon Áargarð (594020)

**LONIN**
Ein bólkur, sum hevur praktisku ábyrgdirnar av Lonini.
**Kontaktfólk:** Hans (590039) og Lív Clementsen (516714)
**Kontaktfólk í leiðsluni**: Jóhan Syderbø (554818)